# Landsstýrið raðfestir, so tað stendur eftir

*Men tá ið landsstýrið heldur seg kunna raðfesta ikki bara 2, men 10 ár fram - tvs. 8 ár út um sítt egna valskeið – so kann tað undra, at landsstýrið ikki kann finna innivist fyri eini so átroðkandi neyðugari og samstundis so avmarkaðari íløgu, sum tunnilsgerð til Tjørnuvíkar, sigur Hans Pauli Strøm*

Ólavur í Beiti

Hans Paula Strøm hevur spurt Bjarna Djurholm, hví farleiðin til Tjørnuvíkar ikki er tikin við í raðfestingina á samferðsluøkinum, sum boðað verður frá í uppskoti landsstýrisins til nýggja løgtingsfíggjarlóg? Hví er farleiðin til Tjørnuvíkar heldur ikki tikin við í raðfestingina í 10-ára íløguætlanini, sum landsstýrið hevur lagt fyri flokkarnar sum grundarlag fyri eini breiðari semju um eina langtíðaríløguætlan? Hvørjar kanningar hevur landsstýrismaðurin/landssverkfrøðingurin gjørt av vegasambandinum til Tjørnuvíkar, herundir fyrireikandi kanningar av gerð av bergholi til Tjørnuvíkar, og hvat metir landsstýrismaðurin/landsverkfrøðingurin, at kostnaðurin kann verða av einum bergholi til Tjørnuvíkar, alt eftir hvussu stutt tað kann gerast, og hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin/landsverkfrøðingurin um vegasambandið til Tjørnuvíkar?

## Smærri verkætlanir

Í viðmerkingunum, sigur Hans Pauli Strøm, at tann 10. februar 1999 settu løgtingsmenninir í Norðstreymoy, Jógvan Durhuus, Jákup Suni Joensen og Hans Pauli Strøm, fyrispurning til táverandi landsstýrismannin um, hví einki varð sagt um Tjørnuvíkarvegin í teirri samferðsluætlanin, sum landsstýrismaðurin tá hevði lagt fram. Og spurt varð, hvørjar ætlanir landsstýrið hevði um Tjørnuvíkarvegin.

– Svarið frá lands-stýrismanninum tá var, at tann samferðsluætlanin hjá landsstýrinum bara skuldi lýsa høvuðsmyndina, og tískil høvdu »smærri verkætlanir« sum hendan ikki fingið innivist. Í orðaskiftinum um fyrispurningin legði landsstýrismaðurin tó aftrat, at landsverkfrøðingurin hevði hugt upp á spurningin og metti, at tað vanliga lapparíið upp á vegin bøtir ikki nóg væl, og at tað einasta, sum nóg væl kundi loysa henda trupulleikan, er eitt berghol til Tjørnuvíkar.

– Nú hevur landsstýrið so aftur lagt uppskot fram um løgtingsfíggjarlóg fyri 2001. Her eru m.a. settir nógvir pengar av til stórar og víðfevndar útbyggingar av samferðslukervinum. M.a. eru til bara hetta eina fíggjarárið 2001 settar av heilar 62 mió. kr. til landsvegir, berghol og undirsjóvartunnlar. Haruppií eru longu nú 3 mió. kr. settar av til fyrireikandi kanningar av bergholi millum Kambsdal og millum Fjarða og undirsjóvartunnil millum Leirvík og Klaksvík.

## Vandi fyri lív

– Tjørnuvíkarvegurin er ikki tikin uppá tungu. Ikki eitt orð og ikki ein króna til nakrar kanningar ella fyrireikingar til tunnilsgerð til Tjørnuvíkar.

– Jú, landsstýrið raðfestir, so tað stendur eftir. Men tá ið landsstýrið heldur seg kunna raðfesta ikki bara 2, men 10 ár fram - tvs. 8 ár út um sítt egna valskeið – so kann tað undra, at millum hesar nógvu hundraðtals milliónirnar kann landsstýrið ikki finna innivist fyri eini so átroðkandi neyðugari og samstundis so avmarkaðari íløgu, sum tunnilsgerð til Tjørnuvíkar.

– Tað allar fremsta fyrilitið fyri eini raðfesting av íløgum á samferðslukervinum má vera at tryggja tær farleiðirnar, har vandi er fyri lív og heilsu hjá tí fólki, sum hevur tørv á hesum farleiðum. Farleiðin til Tjørnuvíkar er ein av hesum, sigur Hans Pauli Strøm m.a. í viðmerkingunum til fyrispurning.



*Tá landsstýrið raðfestir so mong ár fram í tíðina, er tað løgið, at eitt so átrokandi mál sum tunnil til Tjørnuvíkar ikki stendur á listanum*

# Sparikassin keypt stóran part av Kaupthing

*Føroya Sparikassi hevur keypt 4,1 prosent av partapeninginum í íslendska íløgubankanum, Kaupthing, og telist nú millum størstu partaeigararnar*



John Johannessen

Føroya Sparikassi hevur gjørt av at keypa 4,1 prosent í stóra íløgubankanum hjá íslendsku sparikassunum fyri 40 milliónir krónur.

Hesum boðar Marner Jacobsen, forstjóri í sparikassanum, frá í tíðindaskrivi til føroysku fjølmiðlarnar.

Íløgan verður gjørd í sambandi við, at íslendsku sparikassarnir hava gjørt av at víðka partapeningin hjá Kaupthing, samstundis sum teir skráseta bankan á íslendska virðisbrævamarknaðinum. Higartil hava íslendsku sparikassarnir annars einsamallir átt Kaupthing.

## Liður í samstarvinum

Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa, sigur, at íløgan er ein liður í tí samstarvi, sum Sparikassin og Kaupthing fóru undir, tá teir í mai í ár stovnaðu Kaupthing Føroyar.

Føroya Sparikassi tryggjaði sær við hesum samstarvinum rætt til at keypa seg inn í Kaupthing hf. í Íslandi, og er tað hesin rætturin, sum nú verður nýttur.

Kaupthing hevur deildir í New York, Luxembourg, Stockholm og í Havn. Harafturat er Kaupthing í ferð við at stovna eitt felag í Lausanne í Sveis. Á øllum hesum deildunum hjá Kaupthing starvast 220 fólk.

Marner Jacobsen sigur, at íløgan í Kaupthing fyrst og fremst skal síggjast í strategiskum høpi. Við henni fær Sparikassin eitt bein út um landoddarnar, og samstundis fær hann ein samstarvsfelaga, tá tað snýr seg um at veita tænastur á tí føroyska marknaðinum.

– Tann føroyski marknaðurin innan virðisbrøv og eftirlønir stendur fyri stórum broytingum og vøkstri, og her ynskir Sparikassin saman við Kaupthing at luttaka sum tann leiðandi innan økið, sigur Marner Jacobsen, forstjóri, í tíðindaskrivinum.

## Stovnaði virðisbrævamarknaðin

Kaupthing var ein av fimm stovnarum, tá íslendsku virðisbrævamarknaðurin varð settur á stovn í 1986, og er nú við einum marknaðarparti á 30 prosent leiðandi innan partabrævahandil í Íslandi.

Kaupthing varð stovnað í 1982, og fekk í 1997 loyvi frá íslendska fíggjareftirlitinum at virka sum íløgubanki. Íløgubankin veitir ráðgeving og rekur handil við virðisbrøvum og gjaldoyra, eins og bankin eisini hevur um hendi fíggjarognarumsiting fyri virkir og privatfólk.

Kaupthing umsitur fíggjarognir fyri 20 milliardir danskar krónur. Hetta er tað sama sum 38 prosent av íslendska marknaðinum.

Børsintroduktión av fyritøkum og útgáva av lánsbrøvum eru eisin millum stóru virkisøkini.

Fíggjarliga er íløgan í Kaupthing ein liður í at víðka um virðisøkið og spjaða váðan hjá Sparikassanum á fleiri marknaðir heldur enn ein, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.



# Stevna við somu kós móti fullveldinum

*Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, staðfestir, at landsstýrið stendur øksl móti øksl í fullveldismálinum, hóast røddir í Fólkaflokkinum boðað nakað annað*



*Hóast tveir landsstýrismenn hava víst á, at landsstýrið má skifta kós í fullveldismálinum fyri at røkka ætlaða málinum, er Høgni Hoydal framvegis sannførdur um, at landsstýrið skal halda somu kós - og tí skulu landsstýrismenninir vera samdir í*

John Johannessen

Tað verður eitt samt landsstýri, sum 26. oktober fer til Danmarkar at samráðast við donsku stjórnina um føroyskt fullveldi eftir sama leisti, sum á undanfarnu samráðingarfundunum.

Hetta staðfestir Høgni Hoydal í sambandi við, at føroysku fjølmiðlarnir seinastu tíðina hava víst á, at partar av Fólkaflokkinum ynskja at leggja kósina í fullveldismálinum um, fyri at røkka endaliga málinum.

Tað eru tríggir av fremstu persónunum í Fólkaflokkinum, sum alment hava víst á, at teir ynskja, at landsstýrið á komandi samráðingarfundi fer at leggja eitt upplegg fyri donsku stjórnina, ið hevur møguleika fyri at fáa undirtøku, bæði frá donsku stórnini og frá einum pari av føroysku andstøðuni.

Formaðurin í Fólkaflokkinum, Óli Breckman, heldur, at landsstýrið hevur verið einaferð ov ofta til samráðingar við upprunaliga uppskotinum. Hann heldur, at landsstýrið nú má broyta kós, soleiðis at møguleiki verður fyri eini loysn á málinum, ið fær breiða undirtøku. Hetta sama halda landsstýrismenn Fólkafloksins, Jørgen Niclasen og Bjarni Djurholm.

## Partapolitikkur

Men hetta kjakið vil Høgni Hoydal als ikki leggja seg út í.

– Eg fari ikki at gera viðmerkingar til, hvat hendir í Fólkaflokkinum. Fólkaflokkurin má gera sína egnu støðu upp. Landsstýrið heldur fast um allar tær samtyktir og alt annað, ið er gjørt í fullveldismálinum, ger Høgni Hoydal greitt.

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum vísir somuleiðis á, at tað er løgmaður, ið er samráðingarleiðari, og tað er Høgni Hoydal, ið hevur ábyrgdina av at fyrireika samráðingarnar sum landsstýrismaður í sjálvstýrismálum. Tí heldur Høgni Hoydal tað vera óneyðugt at gera viðmerkingar til, hvat aðrir, ið ikki hava nakra ábyrgd í málinum, halda um gongdina.

– Eg kann ikki fara at gera viðmerkingar til, hvat landsstýrismaðurin í vinnumálum og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum halda um fullveldismálið, sigur Høgni Hoydal.

Men landsstýrismaðurin í vinnumálum og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eru kortini stórur partur av samgonguni, og tí kundi hugsast, at hesir sleppa at hava sína avirkan á fullveldismálið.

Hetta hevur Høgni Hoydal tó onga beinleiðis viðmerking til.

– Tað skal eingin ivi vera um, at landsstýrið fer øksl móti øksl til Danmarkar at samráðast. Tað er jú púra alneyðugt, at vit ikki geva mótpartinum ábendingar um, at vit eru ósamdir innanhýsis. Tað er jú tað ringasta, vit kunnu gera í eini samráðingarstøðu, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal sigur seg onga løtu ivast í, at løgmaður hevur stýr á, havt gongur fyri seg í Fólkaflokkinum. Tí løgmaður hevur higartil verið púra greiður í sínum útsagnum um fullveldismálið.

## Øksl móti øksl

Høgni Hoydal heldur tað vera sera umráðandi, at landsstýrið stendur øksl móti øksl í fullveldismálinum, og hann er eisini sannførdur um, at hetta er veruleikin.

Men tað eru kortini tveir landsstýrismenn, ið standa fast við, at teir ynskja at leggja kósina í fullveldismálinum um, fyri yvirhøvur at náa málinum. Tí spyrja vit Høgna Hoydal, um tað ber til at halda fram at siga, at landsstýrið stendur øksl móti øksl í fullveldismálinum.

– Eg vil ikki gera nakrar íøkiligar viðmerkingar til tað, sum hevur verið í fjølmiðlunum um hatta. Eg kann bara siga, at tað er ómetaliga týdningarmikið, at øll eru ábyrgdarfull, og at fólk eru greið um, at tað í hesum týdningarmikla máli, er ógvuliga týdningarmikið, at vit eru greið í okkara útmeldingum og halda fast við gjørdar samtyktir, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal er sannførdur um, at tað higartil er rætt farið fram í fullveldismálinum, og hann er sannførdur um, at tað verður eitt samt landsstýri, ið fer til samráðingar 26. Oktober.

## Standa fast við avtalurnar

Óli Breckmann, formaður í Fólkaflokkinum, hevur tosað um at gera eina avtalu við donsku stjórnina, ið inniber, at vit fáa fullveldi einaferð í framtíðini. Men hetta er ikki nakað, Høgni Hoydal kann taka undir við.

– Vit skulu ikki fara at spekulera í nøkrum, uttan at halda okkum til tær samtyktir og tað grundarlag, vit hava at arbeiða eftir. Og eg ivist onga løtu í, at eingin flokkur ella persónur í samgonguni fer at víkja frá hesum, ger Høgni Hoydal greitt.

Høgni Hoydal harmast annars um, at føroysku fjølmiðlarnir nú eru farnir at gera fullveldismálið til ein samráðingarspurning millum flokkar í Føroyum.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMAT.
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 179.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 128.600,- Garanti**

TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL L/B
Skrás.: 13-01-99
Km.: 28.000
Prísur: 165.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA (Sýnaður 12-99)
Skrás.: 01-05-95
Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 30-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 167.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 52.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear
Skrás.: 13-06-96
Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA CARINA E 1,6 CDX (Sýnaður 01-00)
Skrás.: 16-10-96
Km.: 39.000
Prísur: 117.600,- Garanti*

HONDA ACCORD 1,8
Skrás.: 01-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 148.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,8 L/B
Skrás.: 30-12-93
Km.: 140.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 13-12-95
Km.: 87.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 30-05-94
Km.: 107.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96
Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 02-07-90
Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 27-07-93
Km.: 115.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90
Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

KIA SEPHIA 1,5
Skrás.: 17-04-97
Km.: 59.000
Prísur: 62.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 Xli (Sýnaður 09-00)
Skrás.: 11-06-91
Km.: 108.000
Prísur: 48.600,-

SUZUKI BALLENI 1,6 GLX
Skrás.: 26-06-96
Km.: 52.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

AVHEINTINGAR-TILBOÐ

TOYOTA CAMRY 1,8 XL (Sýnaður 04-99)
Skrás.: 30-06-88
Km.: 240.000
Prísur: 15.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 DS (Sýnaður 05-00)
Skrás.: 09-06-87
Km.: 221.000
Prísur: 15.600,-

NISSAN BLUEBIRD (Sýnaður 08-00)
Skrás.: 12-06-87
Km.: 157.000
Prísur: 17.600,-

NISSAN BLUEBIRD
Skrás.: 26-03-86
Km.: 192.000
Prísur: 2.000,-

OPEL ASCONA 1,6
Skrás.: 01-01-87
Prísur: 3.600,-

VW TRANSPORTER
Skrás.: 17-02-87
Km.: 190.000
Prísur: 18.600,- V/ DUP. KABINU

VØRUVOGNAR

TOYOTA DYNA 150 V/ LAST
Skrás.: 24-02-97
Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL
Skrás.: 05-11-86
Km.: 230.000
Prísur: 48.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Prísur: 39.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

Støkkið inn á gólvið!

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820